# urin virkast umborð ella í landi?



*Skálaberg, sum helst skal fiska fyri einar 60-70 miljónir krónur um árið, hevði neyvan havt teir stóru møguleikarnar undir Føroyum við verandi fiskiskapi og fiskaprísum. – Men tað er ikki vist, at eitt bíligari verksmiðjuskip ikki kundi fingið lønsemi í veiði og virking undir Føroyum, sigur Hanus Hansen, reiðari og virkisstjóri*



*Hanus Hansen heldur, at tað sær dapurt út við fiskaframleiðsluni á landi í løtuni, meðan tað sær heldur betur út hjá fiskiflotanum, hóast flotin altíð fer at skiftandi umstøður*



*- Eg haldi, at tað hevði einki gjørt, um landsins myndugleikar fokuseraðu eitt sindur meira upp á at virka ein part av fiskinum umborð. So leingi, vit útflyta 50.000 tons av óvirkaðum fiski um árið, haldi eg tað vera púrasta burtur við, at møguleikin at virka ein part av hesum fiski umborð ikki verður umhugsaður, sigur Hanus Hansen, reiðari og virkisstjóri.*

seinastu árini útfluttur fiskur og óviðgjørdur.

- Men sambært lógini um vinnuligan fiskiskap er ikki loyvt at virka fiskin umborð undir Føroyum, men tað er í staðin loyvt at flyta hann óvirkaðan á útlendska marknaðin.

- Tað eru bert tvey skip, sum hava undantaksloyvi at virka fisk umborð undir Føroyum, og tey eru Næraberg og Norðborg.

## Púrasta burturvið

Hanus heldur tað vera púrasta burtur við, at eitt nú Sundaberg, sum hevur gulllaksakvotu undir Føroyum, ikki sleppur at virka fiskin til fars umborð, tí henda framleiðsla partú skal vera uppi á landi – og bara uppi á landi.

- Vit sleppa at kryvja fiskin og kubba høvdið av honum. Tað er alt. Marknaður er fyri rundfrystum gulllaksi í eitt nú Kina, men har vilja teir ikki hava tann smáa gulllaksin.

Reiðarin og virkisstjórin vísir á, at tað eisini er avmarkað, hvussu nógv gulllaksavirkið í Leirvík megnar at taka ímóti og selja, og tí átti tað at verið ein gongd leið at útbygt henda marknaðin, sum frammanundan er á gulllaksafarsi – heldur enn bara at siga, at tað oyðileggur marknaðin hjá leirvíkingum, um gulllaksafars eisini verður framleitt umborð.

Hanus veit at siga, at marknaðurin fyri fiskafarsi kring um í heiminum er eini 600.000 tons um árið.

- Gulllaksur er góður og væl umtóktur fiskur, og her hava vit eitt potentiali, sum eg avgjørt haldi, at meira kundi verið fingið burtur úr.

## Politisk avgerð

Hann sigur, at gav landsstýrið loyvi til virking av ymiskum fiskavørum umborð, er ikki vist, at vit beinanvegin høvdu havt 10 nútímans verksmiðjutrolarar undir Føroyum, men lítil ivi er um, at hetta hevði skapt meira arbeiði enn sum nú, tá ið so nógvur fiskur fer óviðgjørdur av landinum.

- Alt, sum verður gjørt í landi, kann eisini gerast umborð á skipunum. Tó sigi eg ikki, at vit skulu flyta alla framleiðslu umborð á skipini. Soleiðis verður tað ivaleyst ongantíð. Vit hava góðar framleiðslur á landi, sum standa seg væl, eitt nú saltfiskaframleiðslu, men vit hava eisini aðrar framleiðslur sum standa seg minni væl.

Hanus heldur eitt nú, at hýsan hevði blivið perfekt, sum hann tekur til, um hon varð virkað umborð.

- Eg haldi, at tað hevði einki gjørt, um landsins myndugleikar fokuseraðu eitt sindur meira upp á at virka ein part av fiskinum umborð. So leingi, vit útflyta 50.000 tons av óvirkaðum fiski um árið, haldi eg tað vera púrasta burtur við, at møguleikin at virka ein part av hesum fiski umborð ikki verður umhugsaður.

Men, sigur reiðarin og virkisstjórin:

- Hetta er ein politisk og ikki umsitingarlig avgerð. Tað, sum liggur aftanfyri hesi sjónarmið, er, at fiskurin skal virkast á landi og ikki umborð á skipum í kapping við framleiðsluna á landi. Við virking umborð í tíðum sum hesum, høvdu vit skapt nógv fleiri arbeiðspláss til føroyskar hendur.

## Meira søluarbeiði

Hanus heldur ikki, at tað hevði loyst allar okkara trupulleikar, um ein partur av fiskinum varð virkaður umborð í staðin fyri at farið óvirkaður av landinum.

- Men eg haldi avgjørt, at myndugleikarnir sum nevnt áttu at latið upp fyri hesum møguleikanum, samstundis sum arbeitt eigur at verða meira miðvíst við, hvussu vit kunnu økja um okkara marknaðarpart av fiskavørum, sigur Hanus Hansen, reiðari og virkisstjóri, at enda.